# Lønarkappingarføri í flakavinnuni

## Føroya Ráfiskakeyparafelag

**Eitt serrit í samband við ársfrágreiðing hjá felagnum**

15. apríl 2005

# Innihald

**1. INNLEIÐING ... 3**

**2. STØÐAN Í FØROYSKU FLAKAVINNUNI ... 4**

2.1 VIÐURSKIFTIR, SUM ÁVIRKA STØÐUNA HJÁ FLAKAVINNUNI ... 5

**3. LØNARSTØÐI OG KAPPINGARFØRI ... 6**

3.1 KOSTNAÐARSAMANBERING – HUGSA DØMI ... 8

**4. VIRÐISØKING OG LØNARVØKSTUR ... 10**

4.1 HÆKKANDI KOSTNAÐUR PR. KILO RÁFISK ... 11

**5. LØNARVØKSTUR OG LØNARKAPPINGARFØRI ... 13**

5.1 LØNARGONGDIN Í FØROYUM ... 13

5.2 LØNARGONGDIN Í DANMARK OG HJÁ EURO-LONDUM ... 15

5.3 LØNARGONGDIN Í FØROYUM OG HJÁ EURO-LONDUM VIÐ FØROYSKUM VEKTUM ... 16

5.4 LØNARGONGDIN Í FØROYUM OG STÓRABRETLANDI ... 18

5.5 LØNARGONGDIN Í FØROYUM MÓTVEGIS ÚTLANDINUM ... 19

**6. LØNARKANNING HJÁ HAVNAR ARBEIÐSMANNAFELAG ... 21**

6.1 LØNARGONGD FYRI ARBEIÐSMENN OG AÐRAR LØNARBÓLKAR Í FØROYUM ... 21

6.2 LØNARGONGD FYRI ARBEIÐSMENN ÍMUN TIL ONNUR LOND ... 21

**7. NIÐURSTØÐA ... 23**

**8. ALHEIMSGERÐ OG ÚTVEITING ... 24**

8.1 LØNARPARTUR AV FRAMLEIÐSLUVIRÐI ... 24

8.2 HÆKKANDI LØNIR TILSKUNDA ÚTVEITING ... 27

8.3 NÝGGJUR SETNINGUR FYRI FLAKAVINNUNA ... 28

**9. KELDULISTI ... 30**

# Yvirlit yvir talvur og myndir

Talva 1. Samlað úrslit í flakavinnuni frá 1999 til 2004. 4
Talva 2. Samlaður soliditetur í flakavinnuni frá 1999 til 2004. 4
Talva 3. Tímaløn í ymsum londum í 2004. 6
Talva 4. Meirvinningur hjá flakavirkjum við lønum í øðrum londum. 7
Talva 5. Framleiðslukostnaður í ávikavist Kina og Føroyum 9
Talva 6. Virðisøking og lønarvøkstur í flakavinnuni pr. kilo ráfisk 10
Talva 7. Framleiðsluvirði og lønir pr. ársverk 10
Mynd 1. Vøkstur í virðisøking og løn pr ársverk 11
Talva 8. Eykakostnaður av lønarvøkstri síðani 1999 12
Mynd 2. Gongdin í sáttmálalønini í Føroyum 14
Mynd 3. Lutfalsligur lønarvøkstur í Føroyum 14
Mynd 4 Lutfalsligur vøkstur í arbeiðskostnaðinum. Danmark og euro-lond 15
Mynd 5. Lutfalsligur vøkstur í arbeiðskostnaðinum – íroknað Føroyar 16
Mynd 6. Lutfalsligur vøkstur í arbeiðskostnaðinum. Føroyar og euro-lond 17
Mynd 7. Lutfalsligur vøkstur í arbeiðskostnaðinum. Føroyar og euro-lond. í DKK 18
Talva 9. Lønarkappingarførið millum Føroyar og Bretland 19
Talva 10. Effektiva lønarkappingarførið 19
Mynd 8. Lønarkappingarføri 20
Talva 11. Lønarparturin av framleiðsluvirðinum í ymsum donskum vinnum 24
Talva 12. Lønarpartur í Føroyum og í øðrum londum. 25
Talva 13. Lønarpartur á ymsum føroyskum virkjum í 2002. 26

## 1. Innleiðing

Virkisleiðarar í føroysku flakavinnuni hava seinastu tíðina ført fram, at flakavinnan er ikki kappingarfør, og ein høvuðsorsøk er, at lønirnar seinastu árini eru hækkaðar ov nógv.

Samtíðis hevur Havnar Arbeiðsmannafelag gjørt eina kanning, sum vísir, at lønirnar í Føroyum ikki hækka samsvarandi lønini í londunum, sum føroyska flakavinnan kappast við.

Føroya Ráfiskakeyparafelag vil tí her viðgera hendan spurningin.

Ritið er ein lýsing av lønargongdini í Føroyum. Fyrst verður hugt eftir støðuni í føroysku flakavinnuni. Síðani verður roynt at staðfesta lønarkappingarføri fyri flakavinnuna við at samanbera lønargongdina við onnur lond.

Faktiska tímalønin í ymsu londunum verður samanlíknað við føroysku tímalønina, tí hon sigur nakað um, hvussu kappingarfør útflutningsvinnan er.

Hugt verður eftir, hvussu produktivitetsøkingini í útflutningsvinnuni hevur verið í mun til lønarvøksturin seinastu árini.

Ritið nertir eisini við kjakið um alheimsgerðina, sum leggur føroysku útflutnings-vinnuna undir harða kapping.

Viðmerkjast skal, at ritið bert viðger ófaglærda arbeiðsmegi.

## 2. Støðan í føroysku flakavinnuni

Ein háttur at meta um støðuna í føroysku flakavinnuni er at hyggja eftir avrikinum hjá vinnuni. Í talvu 1 niðanfyri eru samlaðu úrslitini hjá vinnuni víst. Tølini eru frá kanningini hjá Rasmussen og Weihe, sum umfatar áleið 90% av føroysku flakavinnuni. Tølini fyri 2004 er ein leyslig meting hjá Ráfiskakeyparafelagnum.

Talva 1. Samlað úrslit í flakavinnuni frá 1999 til 2004.

| Ár | Úrslit í flakavinnuni |
|---|---|
| 1999 | 28,5 mió. kr. |
| 2000 | 21,2 mió. kr. |
| 2001 | 52,6 mió. kr. |
| 2002 | 45,0 mió. kr. |
| 2003 | 0,4 mió. kr. |
| 2004 | -30,0 mió. kr. |

Kelda: Rasmussen og Weihe og Føroya Ráfiskakeyparafelag

Talva 1 vísir, at úrslitini hava hækkað fram til 2001, og 2002 var eisini rímiligt. Í 2003 var úrslitið ikki nøktandi við tað, at eingin vinningur var, og í fjør var beinleiðis hall í vinnuni. Í inniverandi árið eru útlitini ikki batnað, og ikki kann roknast við, at úrslitið verður frægari enn í fjør.

Talva 2 niðanfyri vísir soliditetin í flakavinnuni. Soliditetur sigur nakað um, hvussu vinnan er før fyri at klára seg í framtíðini.

Talva 2. Samlaður soliditetur í flakavinnuni frá 1999 til 2004.

| | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|
| Soliditetur | 44,4 | 40,6 | 43,4 | 46,7 | 43,4 |
| - hægst | 58,1 | 58,3 | 66,5 | 75,3 | 76,2 |
| - lægst | 25,3 | 9,6 | 9,7 | 26,8 | 20,7 |

Kelda: Rasmussen og Weihe

Flakavinnan hevur havt nøkur góð ár, og fyritøkurnar í vinnuni hava góðan soliditet. Miðal hevur soliditeturin ligið omanfyri 40, sum merkir, at tær hava styrki til at kappast í framtíðini. Undirskotið í fjør var stórt, og enn eru tøl ikki klár fyri at áseta soliditetin, men undirskotið viðførir møguliga, at soliditeturin

fellir niður um 40, sum ikki gevur ábendingar um, at vinnan enn er í trupulleikum. Men sjálvsagt er stór spjaðing millum fyritøkurnar.

### 2.1 Viðurskiftir, sum ávirka støðuna hjá flakavinnuni

Lønarvøksturin hevur verið munandi størri tey seinastu árini, sum hevur ávirkað úrslitið í flakavinnuni sera nógv. Lønarvøksturin verður nærri viðgjørdur seinni í ritinum. Onnur viðurskiftir hava eisini stóra ávirkan á støðuna í flakavinnuni. Høvuðsviðurskiftini eru fiskaprísir, gjaldoyra, smáttfallandi fiskur og lutfalsliga stóra útboðið av fiski úr Íslandi og Norra, sum føroyska flakavinnan ikki hevur atgongd til.

Fiskaprísirnir eru lækkaðir rættiliga nógv seinastu tvey árini, serliga fyri frystar úrdráttir. Saltfiskaprísurin hevur hildið sær væl, men er í ár settur undir trýst serliga úr Íslandi. Lágir fiskaprísir á siðbundnu marknaðunum fyri frystar fiskavørur skyldast, at útboðið er støðugt vaksandi av hvítfiski. Onnur fiskasløg sum tilapia hava vunnið marknaðarpart og er eitt alternativ til vanliga hvíta fiskin. Eisini verður fiskur fluttur út í láglønarlond at vera framleiddur, sum síðani endar á somu marknaðum. Hesin fiskurin hevur ein lægri kostnað og trýstir tí prísin.

Lági kursurin á amerikanska dollaranum ávirkar einamest avrikið hjá føroysku flakavinnuni. Tann veiki dollarin hevur viðført, at tað fæst meira fyri fiskin í Evropa enn í USA. Fiskur, sum vanliga hevur verið seldur í USA, leitar sær inn í ES, tí evroin er sterk í mun til dollarin. Hetta viðførir, at fiskaprísurin í ES er undir stórum trýsti.

Serliga er støddin á upsanum fallin, og hevur hon veitt flakavinnuni trupulleikar. Smáttfallandi upsi viðvirkar til, at tað er dýrari at framleiða hann, og í ávísan mun skulu nýggir marknaðir finnast fyri smáa fiskin.

Ísland og Norra hava størri fiskatilfeingi enn Føroyar, sum gevur fyritøkunum har ein fyrimun, bæði tí at rávøran fæst bíligari úr sjónum, og tí at størri nøgdir geva lægri framleiðslukostnað. Kumuleringsavtalan, sum flakavinnan enn bíðjar eftir, hevði loyst trupulleikan, tí føroysk virkir høvdu í ávísan mun fingið atgongd til hesa rávøru.

## 3. Lønarstøði og kappingarføri

Føroyar verða mettar sum eitt háglønarland samanlíkna við tey lond, sum føroyska flakavinnan kappast við. Føroyska flakavinnan kappast einamest við íslendska flakavinnu, sum framleiðir størt sæð somu vørur sum føroyska flakavinna, og selir eisini til somu keyparar og marknaðir.

Eisini er føroyska flakavinnan í beinleiðis kapping við Bretland, sum sæst aftur í tí stóru nøgd av óvirkaðum fiski, sum fer til Bretlands.

Alheimsgerðin hevur ført við sær, at føroysk flakavirkir í dag eisini eru í kapping við láglønarlond, og sjónligasta kappingin kemur í dag úr Kina og úr Baltisku londunum.

Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur samanborið tímalønina hjá føroyskum flakavirkjum við tímalønina í londunum, hvørt virkir flakavinnan í Føroyum kappast við. Lønirnar eru í talvu 3 niðanfyri.

Talva 3. Tímaløn í ymsum londum í 2004.

| Lond | Tímaløn | ímun til Føroyar |
|---|---|---|
| Íslandi | 77 | 64% |
| Norra | 119 | 99% |
| Hetland | 78 | 65% |
| Kina | 5 | 4% |
| Baltikum | 12 | 10% |
| Føroyar | 120 | 100% |

Kelda: Føroya Ráfiskakeyparafelag, SNG. Tímaløn: minstaløn + feriuløn + sosialar veitingar.

Ein tímaløn í teimum baltisku londunum kostar 5,64 kr. Um hædd verður tikin fyri teimum sosialu kostnaðunum hækkar lønin kanska til 12 krónur arbeiðstímin.

Í Kina er minimumslønin 120 dollarar um mánaðan, men arbeiðsmegin í útflutningsvinnuni kostar vanliga 200 dollarar um mánaðan fyri 6 dagar um vikuna við 12 tímar arbeiðsdag. Við einum kursi á 7 krónur dollarin svarar hetta áleið til 1.400 krónur um mánaðan. Ein kinesari arbeiðir áleið 280 tímar um mánaðan, sum svarar til 5 krónur um tíman í arbeiðsløn.

Burtursæð frá Norra hava øll londini lægri tímaløn enn føroyska flakavinnan. Tímalønin í Íslandi er 64% av føroysku lønini, og í Hetlandi er lønin 65% av føroysku lønini. Baltisku londini og Kina er ein beinleiðis hóttan ímóti arbeiðsplássunum í føroysku flakavinnuni, har lønin bert er ein brøkpartur av føroysku lønini.

Fyri at seta hetta ímun til avrikið hjá føroysku flakavinnuni ber til at seta lønina í ymsu londunum inn ístaðin fyri føroysku lønina fyri at síggja, hvat vinningurin hevði verið í føroysku flakavinnuni.

Sambært Rasmussen og Weihe var miðal lønarútreiðslan í føroysku flakavinnuni í 2003 á 3,55 kr/kg. Skiftandi lønarparturin er nakað lægri áleið 2,75. Um – alt annað líka – lønirnar í øðrum londum høvdu verið í Føroyum, hevði meirvinningurin í flakavinnuni verið sum víst í talvu 4 niðanfyri.

Talva 4. Meirvinningur hjá flakavirkjum við lønum í øðrum londum.

| Flakavirki | Ráfiskabýtið | Ísland | Norra | Hetland | Kina | Baltikum |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kósin | 15,8% | 11.824 | 275 | 11.549 | 31.621 | 29.696 |
| Fiskavirking | 42,9% | 32.103 | 747 | 31.357 | 85.857 | 80.631 |
| Fiskavirkið | 9,3% | 6.959 | 162 | 6.798 | 18.612 | 17.479 |
| Vaðhorn | 3,2% | 2.395 | 56 | 2.339 | 6.404 | 6.014 |
| Delta | 5,1% | 3.816 | 89 | 3.728 | 10.207 | 9.586 |
| Sandoy | 10,0% | 7.483 | 174 | 7.309 | 20.013 | 18.795 |
| Norðís | 2,4% | 1.796 | 42 | 1.754 | 4.803 | 4.511 |
| Eystís | 2,1% | 1.571 | 37 | 1.535 | 4.203 | 3.947 |
| Vestís | 1,8% | 1.347 | 31 | 1.316 | 3.602 | 3.383 |
| Suðurís | 2,4% | 1.796 | 42 | 1.754 | 4.803 | 4.511 |
| Palm | 2,4% | 1.796 | 42 | 1.754 | 4.803 | 4.511 |
| FarIta | 2,6% | 1.946 | 45 | 1.900 | 5.203 | 4.887 |
| Tilsamans | 75.940 | 74.833 | 1.740 | 73.092 | 200.134 | 187.952 |

Kelda: Rasmussen og Weihe og egnar útrokningar. Meirvinningurin er roknaður, sum lutfalsligi munurin í lønum frá talvu 3 ferðinar 2,75 ferðirnar rávørunøgd pr. virkið

Talva 4 vísir, at meirvinningurin hjá føroysku flakavirkjunum hevði verið rættiliga nógv hægri, um sama lønarlag var í Føroyum sum í øðrum londum burtursæð frá í Norra. Um íslendskar lønir vóru í Føroyum, hevði meirvinningurin

verið 74 mió. kr. og eitt nú Føroya Fiskavirking hevði havt ein meirvinning á 32 mió. kr.

Ein tílík samanbering er bert møgulig, um antikið verður, at alt annað er líka. Hugsast kann, at um vinningurin var, sum víst omanfyri, hevði hann lokkað nýggjar fyritøkur inn á marknaðin, og kappingin hevði verið økt, og rávøruprísirnir høvdu hækkað til gagns fyri veiðuliðið. Myndin er ikki heilt rættvísandi, men tølini tala fyri seg.

Hugsast kann, at munur er á produktiviteti millum lond. Eisini kann hugast, at um lønirnar ikki høvdu hækkað, høvdu umstøðurnar loyvt størri nøgd at verið framleidd á virkjunum, og úrslitið hjá virkinum hevði verið betri, tí samlaðu eindarkostnaðirnir høvdu lækkað.

## 3.1 Kostnaðarsamanbering – hugsa dømi

Um frammanfyrinevndu útreiðslur verða brúktar sum grundarlag undir einari kostnaðarsamanbering millum Kina og Føroyar ber til at áseta munin í framleiðslukostnaði. Dømi verður tikið fyri eitt toskaflak, sum verður ávikavist framleitt í Kina og í Føroyum. Ráfiskurin verður í báðum førðum keyptur í Føroyum.

Prísurin fyri ein tosk við høvdi er 18 kr/kg. Úrtøkan fyri eitt skræðuleyst og beinfrítt toskaflak í Føroyum verður mett at vera áleið 45%. Úrtøkan í Kina verður mett at vera áleið 10% betri.

Flutningskostnaðurin av at flyta eina bingju til Kina við 20 tonsum er 4.000 dollarar. Síðani kostar tað 3.000 dollarar úr Kina inn á evropeiska marknaðin. Tilsamans kostar flutningurin áleið 2,50 kr/kg við einum kursi á 7 krónur dollarin. Flutningskostnaðurin til Kina er eykakostnaðurin fyri framleiðsluna í Kina. Flutningurin úr Kina til Europa er 3.000 dollarar. Eingin flutningskostnaður verður roknaður úr Føroyum til Evropa, tí flutningskostnaðurin er við í virðisøkingini á 6,02 kr/kg, sum Rasmussen og Weihe hevur funnið fram til.

Eitt virki í Kina klárar seg við 40 cents pr kilo liðugtvøru. Um úrtøkan verður mett at vera 55% gevur tað 22 cents pr. kilo ráfisk. T.v.s. við einum kursi á 7 krónur dollarin krevur kinesiska virkið eina virðisøking á 1,54 kr/kg fyri at avløna framleiðslumiðlarnar. Í Føroyum var virðisøkingin 6,02 kr/kg í 2003, og tá var einki avlop. Sostatt krevst fýra ferðir stór virðisøking í Føroyum. Útfrá omanfyristandandi metingum ber til at áseta framleiðslukostnaðin.

Talva 5. Framleiðslukostnaður í ávikavist Kina og Føroyum

| | Kina | Føroyar |
|---|---|---|
| Rávøruprísur | 18,00 | 18,00 |
| Fraktkostnaður | 1,40 | - |
| Rávøra íalt | 19,40 | 18,00 |
| Virðisøking | 1,54 | 6,02 |
| Tilsamans | 20,94 | 24,02 |
| Úrtøka | 55% | 45% |
| liðugtvøra | 38,07 | 53,38 |
| Fraktkostnaður | 1,05 | - |
| Kostnaður íalt | 39,12 | 53,38 |
| Munur | | -14,26 |

Kelda: egnar útrokningar

Útrokningin vísir, at framleiðslukostnaðurin í Kina er væl lægri enn í Føroyum. Havast skal tó í huga, at aðrar útreiðslur koma afturat. Ofta er kostnaðarmikið at byrja eina nýggja framleiðslu í øðrum landi. Eisini skulu føroyingar við framleiðsluvitan flytast til Kina, meðan framleiðslan verður sett upp. Fyri at flyta fiskin til Kina skal hann frystast. Hetta krevur antin eina eyka íløgu umborð á skipunum ella eina eyka útreiðslu á landi.

## 4. Virðisøking og lønarvøkstur

Virðisøkingin hjá einum flakavirki skal avløna arbeiðsmegina og kapitalin. Virðisøkingin er munurin ímillum framleiðsluvirðið og vørunýtslu. Økingin í virðisøkingin ár frá ári skal vera á hædd ella hægri enn lønarvøksturin, tí annars verður úrslitið hjá felagnum verri.

Rasmussen og Weihe hevur gjørt eina umfatandi lýsing af roknskapunum hjá føroysku flakavinnuni. Lýsingin umfatar áleið 90% av øllum fiski virkaður í Føroyum, og har verður hugt eftir virðisøkingini og lønargongdini hjá hesum feløgum. Tølini eru í talvu 6 niðanfyri.

Talva 6. Virðisøking og lønarvøkstur í flakavinnuni pr. kilo ráfisk

| | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | Vøkstur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Virðisøking | 4,51 | 4,99 | 5,43 | 5,75 | 6,02 | 33% |
| Lønir | -2,63 | -2,76 | -2,82 | -3,13 | -3,55 | 35% |

Kelda: Rasmussen og Weihe og egnar útrokningar

Tølini vísa, at vøksturin í virðisøking hevur verið lægri enn vøksturin í lønum, og hetta ber við sær, at úrslitið og kappingarføri er versnað.

Ein annar háttur at lýsa førleikan hjá flakavirkjunum at gjalda lønarhækkan er at hyggja eftir, hvussu virðisøking pr. starvsfólk er ímun til lønarvøkstur. Í talvu 7 og mynd 1 niðanfyri eru hesi tøl.

Talva 7. Framleiðsluvirði og lønir pr. ársverk

| | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | Vøkstur |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Framleiðsluvirði | 343.847 | 399.821 | 459.917 | 499.370 | 457.120 | 33% |
| Ársverk | 1.105 | 1.189 | 1.240 | 1.280 | 1.264 | 14% |
| Virðið pr. ársverk | 311 | 336 | 371 | 390 | 362 | 16% |
| Vøkstur | | 8% | 10% | 5% | -7% | |
| Lønir pr. ársverk | 181 | 186 | 193 | 213 | 213 | 18% |
| Vøkstur | | 3% | 4% | 10% | 0% | |

Kelda: Rasmussen og Weihe og egnar útrokningar

Mynd 1. Vøkstur í virðisøking og løn pr ársverk




Kelda: Rasmussen og Weihe og egnar útrokningar

Talva 7 og mynd 1 vísa, at virðisøkingin er hægri pr. ársverk tey fyrru árini, meðan í 2002 og 2003 hevur lønarvøksturin verið hægri, og í 2003 fall virðis-økingin. Tølini fyri 2004 eru ikki tøk, men úrslini eru verri, og tí hevur allarhelst verið talan um eina virðislækking.

## 4.1 Hækkandi kostnaður pr. kilo ráfisk

Frá 1999 til 2004 hevur lønarvøksturin verið tilsamans 25 kr. Lønin í 1999 var 95,72 og í 2004 er lønin 120,57. Hesin stóri vøksturin í lønum setir flakavinnuna undir eitt sera stórt trýst, tí leiðslan er noydd til at økja produktivitetin tilsvarandi. Hetta hevur ikki verið møguligt, og tí hevur flakavinnan verri kappingarføri.

Í talvu 8 niðanfyri verður hugt eftir, hvussu nógv meirútreiðslan er hjá flakavirkjunum við lønarhækkanini frá 1999 til 2004. Tøl eru sett upp fyri frystar portiónir - tað verði seg toska-, hýsu- og upsaportiónir - sum er ein stórur partur av framleiðsluni í dag. Tøl eru eisini sett upp fyri flaktan tosk, sum er tann vinnan, har tað gongur best.

Talva 8. Eykakostnaður av lønarvøkstri síðani 1999

| | 1999 | 2004 | Munur |
|---|---|---|---|
| Løn | 95,72 | 120,57 | 24,85 |
| Portiónir: 35 tímar pr. tons RV: | | | 869,75 |
| Flaktur toskur: 12 tímar pr. tons RV: | | | 298,20 |

Kelda: Føroya Arbeiðsgevarafelag

Talva 8 vísir, at framleiðslan av frystum er dýrkað við 87 oyrum pr. kilo ráfisk. Hetta gevur ein eykakostnað fyri alla flakavinnuna um allur ráfiskurin, sum var keyptur, var virkaður til portiónir, á 66,4 mió. kr. Stóra lønarhækkanin tey seinastu árini hevur verið sera kostnaðarmikil fyri føroyska flakavinnu.

Um hugt verður eftir flakta toskinum, er lønarkostnaðurin lægri. Har er lønarvøksturin bert ein triðingur av lønarvøkstrinum fyri frystar portiónir. Í flaktu vinnuni gongur betri partvíst, tí hon ikki er so lønartung og eisini tí, at føroyingar hava ein serliga góðan tosk at selja. Tjúgdin á føroyska toskinum og tað hvíta royggið gevur føroyska toskinum ein kappingarfyrimun og harvið ein hægri sølupris. Láglønarlondini hava ikki enn loyst trupulleikan við at upptina og salta tosk, og soleingi, sum tøknin ikki hevur loyst tann trupulleikan, vilja føroyingar hava ein kappingarfyrimun. Hinvegin styttist munurin ímillum føroyskan og íslendskan tosk, tí íslendarar hava megnað at økja lutfalsliga um virðið á sínum toski.

# 5. Lønarvøkstur og lønarkappingarføri

Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur samanlíknað arbeiðaralønirnar í Føroyum við arbeiðaralønir[1] í øðrum londum. Í Føroyum eru eingin hagtøl fyri, hvat veruliga lønin er, og tí eru sáttmálalønirnar hjá arbeiðarum lagdar til grund fyri samanberingina. Í flakavinnuni er lønin tann sama sum sáttmálalønin, og tí er tað møguligt, men havast skal í huga, at tá verður ikki tikið hædd fyri t.d. yvirtíð. Lønirnar í hinum londunum eru faktisku lønirnar í framleiðsluvinnuni.

Samanberingin er fyri lønargongdina í framleiðsluvinnuni. Føroya Ráfiskakeyp-arafelag metir, at tað er meira relevant at brúka framleiðsluvinnuna til at lýsa kappingarføri hjá einum landi ímun til eitt annað, tá tað er framleiðsluvinnan sum vanliga er útflutningsvinnan og harvið er í beinleiðis kapping við útlendskar framleiðarar. Eisini er høvuðsparturin av útflutninginum hjá mongum londum ídnaðarvørur.

Tænastuvinnan hinvegin er ikki í sama mun í kapping við útlandi. Tænastur flyta ikki so lætt um landamørk, sum vørur, tí tænastan verður framleidd har, sum kundin er, og sum oftast er kundin partur av tænastuni.

## 5.1 Lønargongdin í Føroyum

Myndin niðanfyri vísur gongdina í sáttmálalønini hjá arbeiðaranum í Føroyum frá 1986 til 2004. Hetta er samlaða lønin arbeiðsgevarin skal rinda, tvs gjøld til frítíðarløn, ALS, barsilsskipanina v.m. eru íroknað.

[1] Svenska Arbetsgivarføreningen hevur hagtøl fyri arbeiðslønir, t.v.s. Labour costs in manufacturing – production workers. RFK metir, at hesi hagtøl eru samanberilig við føroyska arbeiðsmannaløn í flakavinnuni.

Mynd 2. Gongdin í sáttmálalønini í Føroyum




Kelda: Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Mynd 2 vísir, at lønin hækkaði í 80'unum og fram til kreppuna. Undir kreppuni var lítil og eingin lønarvøkstur, men vert er at býta merki í, at lønirnar lækkaðu ikki. Í 1996 byrjaði lønin so smátt at hækka aftur og eftir 1998 tók hon dik á seg. Lutfalsligi vøksturin um árið sæst í mynd 2 niðanfyri.

Mynd 3. Lutfalsligur lønarvøkstur í Føroyum




Kelda: Føroya Arbeiðsgevarafelag

Í tíðarskeiðnum, sum víst er, var størsti vøksturin í tímalønini í 1989 við einum vøkstri á smá 7%. Í kreppuárinum var lønarvøksturin lítil - minnið enn 1%. Men eftir 1998 kom fer á lønarvøksturin og lutfalsligi lønarvøksturin hevur verið áleið 5% um árið og ájavnt lønarvøksturin í 80´unum.

## 5.2 Lønargongdin í Danmark og hjá euro-londum

Mynd 4 niðanfyri vísir lutfalsliga vøksturin í arbeiðskostnaðinum í Danmark og euro-londum fyri tíðarskeiðið 1996 til 2004.

Mynd 4 Lutfalsligur vøkstur í arbeiðskostnaðinum. Danmark og euro-lond




Kelda: Dansk industri. Viðmerking: Strikan hjá Danmark er í donskum krónum og fyri euro-londini í euro. Men av tí at danska krónan í mun til euro hevur havt ein meira ella minni fastan kurs í tíðarskeiðnum, er samanberingin møgulig. Euro-londini eru Týskland, Holland, Finland, Belgia, Frakland og Italia.

Strikan fyri eurolondini er eitt vigað miðaltal fyri eurolondini, har londini eru vektað ímun til effektiva krónukursindeksið, sum Danmark Statistik útroknar fyri Danmark.[2]

[2] Indeksið fyri effektiva krónukursin er eitt geometrisk miðaltal av gongdini av gjaldoyranum hjá 25 av teimum mest týðandi samhandilslondunum Danmarkar, har gjaldoyra hjá einum landi verður vektað ímun til lutfalsliga samhandilin, sum tað hevur við Danmark. Krónukursindeksið gevur tí eitt miðaltal fyri, hvussu virðið á donsku krónini broytist í mun til gjaldoyra hjá týdningarmestu samhandilslondum hjá Danmark.

Mynd 3 vísir týðuliga, at lønirnar í Danmark hava hækkað skjótari enn hjá euro-londunum, og Danmark hevur tí mist lønarkappingarføri í øllum tíðarskeiðnum. Í 2004 er munurin millum strikurnar 15%.

Í mynd 5 niðanfyri er lønargongdin í Føroyum eisini sett inn. Mynd 4 vísir, at lønirnar í Føroyum frá 1998 hækka skjótari enn bæði í Danmark og í eurolond-unum.

Mynd 5. Lutfalsligur vøkstur í arbeiðskostnaðinum – íroknað Føroyar




Kelda: Dansk Industri og Føroya Arbeiðsgevarafelag

## 5.3 Lønargongdin í Føroyum og hjá euro-londum við føroyskum vektum

Ikki er rætt at seta føroysku lønargongdina inn í mynd 4 omanfyri, tí miðal lønarvøksturin fyri eruolondini er gjørd út frá samhandilsmynstrinum hjá Danmark. Tvs. at lønargongdin í til dømis Týsklandi viðjar nógv, tí Danmark hevur stóran samhandil við Týskland. Hetta samhandilsmystrið er ikki tað sama fyri Føroyar. Trupulleikin er tó, at í Føroyum er einki krónukursindeks, og tí er neyðugt at finna aðrar vektir.

Valt er at vekta londini út frá miðal útflutninginum til londini frá 1996 til 2003. Umframt Týskland, Holland, Finland, Belgia, Frakland og Italia er eisini Spania

og Danmark íroknað. Í Danmark er krónan gjaldoyra, men av tí at talan hevur verið um ein meira ella minni fastan kurs við euro, er tað við í euro-bólkinum.[3] [4]

Úrslitið sæst í mynd 6 niðanfyri, sum vísir lutfalsliga lønarvøksturin í arbeiðara-lønunum í Føroyum og lutfalsliga arbeiðskostnaðin í euro-londunum. Myndin vísir, at gongdin vendi í 1998. Tá varð lønarvøksturin í Føroyum hægri enn í eurolondunum og lønarkappingarfyrimunirnir, sum føroyingar vunnu sær undir kreppuni, hvørva.

Mynd 6. Lutfalsligur vøkstur í arbeiðskostnaðinum. Føroyar og euro-lond




Kelda: Dansk Industri og Føroya Arbeiðsgevarafelag

[3] Rættast hevði helst verið at brúkt dubulta vekting – tvs. at rokna týdningin av londunum í okkara egna uttanlandshandli umframt týdningin hjá hvørjum teirra á teimum marknaðum, vit handla við.

[4] Viðmerkjast skal, at lønarhagtølini fyri útlandi í øllum útrokningum eru frá framleiðsluvinnuni og ikki frá flakavinnuni, sum føroysku hagtølini byggja á. Hinvegin er framleiðsluvinnan tað tættasta vit koma, umframt at tað er gongdin í lønum hugt verður at. Sannlíkt er, at menningin hevur verið nøkunlunda tann sama í framleiðsluvinnunum sum í flakavinnuni. Harafturat er lønin í útlandinum samlað løn, meðan lønin í Føroyum er sáttmálaløn.

Mynd 7 vísir somuleiðis lutfalsliga lønarvøksturin í arbeiðarlønunum í Føroyum og lutfalsliga arbeiðskostnaðin í euro-londunum. Munurin er tó, at lønargongdin í euro-londinum er roknað um til krónur, tí hóast kursurin millum euro og donsku krónuna ikki flytir seg stórvegis, er kursurin ikki heilt fastur. Miðalárskursurin frá heimasíðuni hjá Tjóðbankanum er brúktur sum grundarlag fyri útrokningunum. Eisini mynd 7 vísir, at Føroyar tey síðstu árini hava mist lønarkappingarføri.

Mynd 7. Lutfalsligur vøkstur í arbeiðskostnaðinum. Føroyar og euro-lond. í DKK




Kelda: Svensk Næringsliv, Tjóðbankin og Føroya Arbeiðsgevarafelag

## 5.4 Lønargongdin í Føroyum og Stórabretlandi

Omanfyri var lønargongdin í Føroyum samanborin við lønargongdina í euro-londum. Fyri hesi lond bar tað til beinleiðis at samanbera lønargongdina, tí kursurin millum krónuna og euruna hevur verið fastur í tíðarskeiðnum.

Stórabretland er ikki við. Í miðal fór 24,1% av útflutninginum í tíðarskeiðnum 1996 til 2003 til Stórabretland. Stórabretland hevur eins og Danmark valt at varðveita egið gjaldoyra, tvs. pundið. Men av tí at kursurin millum krónuna og pundið ikki liggur fastur, er neyðugt í samanberingini eisini at taka hædd fyri gjaldoyramenningini millum krónuna og pundið. Talva 9 niðanfyri vísur gongdina í lønarkappingarførinum millum Føroyar og Bretland frá 1996 til 2003.

Talva 9. Lønarkappingarførið millum Føroyar og Bretland

| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lutfalsligur lønarvøkstur í Føroyum (dkr) | 0,9 | 1,1 | 0,6 | 3,8 | 4,5 | 5,2 | 5,6 | 4,4 |
| Lutfalsligur lønarvøkstur í Bretlandi (£) | 3,8 | 4,3 | 7,1 | 4,3 | -0,6 | 7,0 | 3,8 | 3,7 |
| Broyting í lutfalli millum Føroyar og Bretland | -2,8 | -3,1 | -6,0 | -0,4 | 5,1 | -1,7 | 1,7 | 0,7 |
| Effektivt gjaldoyra - lutfalsligur vøkstur | -2,3 | -16,3 | -2,5 | -1,8 | -7,7 | 2,1 | 1,3 | 10,0 |
| Lønarkappingarføri | -5,0 | -18,9 | -8,4 | -2,2 | -3,0 | 0,4 | 3,1 | 10,7 |

Kelda: Svensk Næringsliv, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Tjóðbankin. Viðmerkingar: Útrokningarnar eru gjørdar á sama hátt, sum Búskaparráðið brúkti í síni frágreiðing frá vári 1998.

Tølini vísa, at frá 1996 til 2001, við undantikið av ár 2000, hækka lønirnar í Bretlandi meira enn í Føroyum, og Føroyar økja tí kappingarførið. Men fyri 2002 og 2003 hækka lønirnar meira í Føroyum enn í Bretlandi.

Eisini er neyðugt at taka hædd fyri gjaldoyraviðurskiftunum fyri at fáa ávíst lønarkappingarførið. Talvan vísir, at lønarkappingarførið hjá Føroyum mótvegis Bretlandi er versnað síðani 2001. Hóast lønirnar í Bretlandi í 2001 hækkaðu meira enn í Føroyum, viðførdi gjaldoyraviðurskiftini, at Føroyar kortini høvdu eitt verri kappingarføri, tí krónan styrknaði mótvegis pundinum.

Fyri 2002 og 2003 hækkaðu lønirnar meira í Føroyum umframt at krónan styrknaði. Lønarkappingarførið versnaði tí meira enn 10% í 2003.

## 5.5 Lønargongdin í Føroyum mótvegis útlandinum

Talva 10 niðanfyri vísur effektiva lønarkappingarførið hjá Føroyum mótvegis teimum londum Føroyar hava størsta samhandilin við frá 1996 til 2003.

Talva 10. Effektiva lønarkappingarførið

| | 1996 | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lønarvøkstur Føroyar | 0,9 | 1,1 | 0,6 | 3,8 | 4,5 | 5,2 | 5,6 | 4,4 |
| Lønarvøkstur útland | 4,8 | 3,2 | 4,7 | 3,4 | 1,7 | 5,5 | 4,1 | 3,4 |
| Lutfall – Føroyar/útland | -3,7 | -2,0 | -3,9 | 0,4 | 2,7 | -0,3 | 1,5 | 1,0 |
| Effektivt gjaldoyra | -1,0 | -5,2 | -0,1 | 0,0 | -3,8 | 1,1 | 0,7 | 3,9 |
| Lønarkappingarføri | -4,6 | -7,1 | -4,0 | 0,3 | -1,1 | 0,7 | 2,2 | 4,9 |

Kelda: Svensk Næringsliv, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Tjóðbankin. Viðmerkingar: Útrokningarnar eru gjørdar á sama hátt, sum Búskaparráðið brúkti í síni frágreiðing frá vári 1998.

Talva 10 vísir, at lønarkappingarførið hjá Føroyum er versnað síðani 1999, við undantakið av ár 2000. Talvan vísir eisini, at sjálvt um føroyingar høvdu ein lægri lønarvøkstur í 2001 samanborið við útlandið, versnaði kappingarførið, tí krónan styrknaði. Fyri 2002 og 2003 eru lønirnar í Føroyum hækkaðar meira enn í útlandinum, samstundis sum krónan er styrknað. Sambært hesum útrokningum versnaði kappingarførið hjá føroyingum við nærum 5% í 2003.

Myndin niðanfyri vísur lønarforholdið, effektiva gjaldoyravirðið og lønarkappingarførið. Tá strikurnar lække, økist kappingarførið, og øvugt minkar kappingarførið, tá strikurnar hækka. Á myndini sæst, at Føroyar tey síðstu 3 árini hava mist lønarkappingarførið, bæði tí lønirnar hækka skjótari í Føroyum, men í størri mun tí danska krónan er styrknað.

Mynd 8. Lønarkappingarføri




Kelda: Svensk Næringsliv, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Tjóðbankin. Viðmerkingar: Útrokningarnar eru gjørdar á sama hátt, sum Búskaparráðið brúkti í síni frágreiðing frá vári 1998.

# 6. Lønarkanning hjá Havnar Arbeiðsmannafelag

Havnar Arbeiðsmannafelag hevur gjørt eina kanning av lønargongdini hjá føroyska arbeiðsmanninum og samanlíkna hana við lønargongdina hjá øðrum samfelagsbólkum í Føroyum og við lønir í øðrum londum.

Føroya Ráfiskakeyparafelag fegnast um, at Havnar Arbeiðsmannafelag hevur tikið stig til eina slíka kanning. Samráðingarumhvørvið í Føroyum vantar hagtøl, og lýsingar av støðuni á arbeiðsmarknaðinum og tilíkar kanningar stimbra umhvørvið og vilja viðvirka til betri samráðingar.

Føroya Ráfiskakeyparafelag vil her gera nakrar viðmerkingar til nevndu kanning.

## 6.1 Lønargongd fyri arbeiðsmenn og aðrar lønarbólkar í Føroyum

Frágreiðingin hjá HA hevur brúkt tíðarskeiðið 1991 og fram, tá ið arbeiðslønin er samanborðin við onnur lond, men hevur bert hugt eftir tíðarskeiðnum frá 1995, tá ið lønirnar eru samanborðnar við aðrar bólkar í Føroyum.

Lønargongdin hjá arbeiðsmonnum síðani 1991 hevur verið á hædd við aðrar bólkar. Í kreppuni fóru teir ikki niður í løn, sum eitt nú starvsmennirnir fóru. Sostatt hevur lønarvøksturin verið størri hjá arbeiðsmonnum. Lønarvøksturin eftir kreppuna hevur verið sera líkur fyri allar bólkar.

HA undirstrikar í kanningini, at arbeiðsmannalønirnar hava hækkað 33% frá 1995, meðan starvsmannalønirnar hava hækkað 41%. Tøl tala, men tøl eru eisini takksom. Um hugt verður eftir lønargongdini síðani 1991 sæst, at arbeiðsmannalønirnar hava hækkað meira enn starvsmannalønirnar.

## 6.2 Lønargongd fyri arbeiðsmenn ímun til onnur lond

Havnar Arbeiðsmannafelag hevur samanborið lønina fyri føroyskar arbeiðsmenn við lønir í øðrum londum. Tølini, sum eru brúkt, eru frá OECD. Lønarvøksturin, sum OECD vísir á, eru, hvussu veruligu lønirnar eru hækkaðar fyri allan privata arbeiðsmarknaðin. Hesi tøl eru ikki tiltaks í Føroyum, og tí eru tey samanborin við sáttmálalønir í Føroyum.

Trupulleikin er, at tað ikki ber til at samanlíkna veruligar lønir við sáttmálalønir, tí ávísar vinnur í Føroyum gjalda hægri løn enn sáttmálalønina.

Eitt nú var miðallønarkostnaðurin um tíman fyri eitt stórt føroyskt flakavirki í 2004 á 133 krónur, tá hædd varð tikin fyri m.a. yvirtíð.

Lønarvøksturin, sum OECD vísir á, er sum sagt fyri alla arbeiðsmegina í privatu vinnuni[5]. Almennar lønir eru ikki við. Tað vil siga, at allir fagbólkar eru við so sum hondverkarar og fólk við høgari útbúgving. Eisini eru allar vinnur við.

Vitandi at tænastuvinnan í Evropa hevur verið í stórum vøkstri er lætt at ímynda sær, at lønirnar eru hækkaðar meira í eitt nú tænastuvinnuni enn í framleiðsluvinnuni. Sostatt er trupult at samanlíkna lønir hjá allari arbeiðsmegini í Evropa við arbeiðsmannalønina í Føroyum.

Um so var, at veruligi miðallønarvøksturin í Føroyum fyri allar bólkar í privatu vinnuni var samanlíknaður við hagtølini frá OECD hevði tað givið eina betri mynd av veruleikanum.

HA hevur eisini lýst lønargongdina seinastu fimm árini, har hugt verður eftir lønargongdini frá 1998 til 2003. Her vísa tølini frá OECD, at føroyski vøksturin er lægri enn hjá øðrum burtursæð frá, at lønarvøksturin í Danmark er lægri enn føroyski vøksturin.

Um tølini frá svenska arbeiðsgevarafelagnum fyri framleiðslulønir vera brúktar ístaðin er lønarvøksturin í Føroyum hægri enn lønarvøksturin í hinum londunum.

---

[5] Grundarlagið undir tølunum frá OECD er nevnt í fótnotuni undir hagtølunum. Har verður sagt, *"The business sector is in the OECD terminology defined as total economy less the public sector. Hence business employees are defined as total employees less public sector employees"*.

## 7. Niðurstøða

Lýsingin av lønargongdini frammanfyri vísir týðuliga, at lønin í flakavinnuni er hækkað skjótari í Føroyum enn í øðrum londum. Hetta hevur viðført, at kappingarføri hjá flakavinnuni er versnað, sum sæst aftur í rakstrinum hjá fyritøkunum í flakavinnuni.

Nakað av lønarhækkanini hava fyritøkurnar megnað at lagt upp fyri við at økja um produktivitetin. Ikki ber til hjá flakavinnuni at koppa eina lønarhækkan yvir á prísin, tí hon er í harðari kapping við flakavinnur í øðrum londum. Lønarparturin er lutfalsliga stórur partur av framleiðslukostnaðinum, og tí sæst ein lønarhækkan aftur á úrslitinum hjá fyritøkunum.

Fyritøkurnar í flakavinnuni geva hall og hava tí ikki ráð at gjalda hækkandi lønir. Hetta viðførir, at virksemi í flakavinnuni minkar, sum hevur við sær, at arbeiðsplássini fækka í útflutningsvinnuni. Eisini vilja hækkandi lønir trýsta fyritøkurnar at skifta lønartungar mannagongdir út við tøkni fyri at lækka kostnaðarstøði. Ein annar møguleiki hjá flakavinnuni er at útveita lønartungar mannagongdir til láglønarlond fyri at klára seg í kappingini á altjóða marknaðinum. Óansæð er vandi fyri at arbeiðsplássini í flakavinnuni fækka, og finnur hendan arbeiðsmegin ikki annað arbeiðið, verður hon arbeiðsleys.

Spurningur kann setast við, hví lønin skal samanlíknast við lønir í øðrum londum, tí ein arbeiðsgevari kann bert gjalda ta løn, hann hevur ráð til samtíðis við, at hann skal gjalda vinning til fyritøkuna.

Sáttmálasamráðingar ímillum partarnar á arbeiðsmarknaðinum áseta lønina og lønin hækkar alt eftir, hvør partur stendur sterkari. Samráðingarúrslitini viðføra sostatt lønarsveiggj. Er úrslitið, at lønirnar hækka skjótari enn produktiviteturin vil tað viðføra verri kappingarføri hjá fyritøkum, sum aftur viðførir, at avkastið verður minni, og arbeiðspláss verða niðurløgd. Yvir tíð vil lønarvøksturin fylgja produktivitetinum, men vert er at býta merki í raðfylgjuna. Fyrst hækkar produktiviteturin, síðani hækkar lønin – og ikki øvugt.

# 8. Alheimsgerð og útveiting

Alheimsgerð er ein mannagongd, sum økir samarbeiði, samhandil og íløgur tvørtur um landamørk, sum viðførir, at londini eru sínámillum meira bundin av hvørjum øðrum.

Alheimsgerðin viðførir, at lønartungar framleiðslur vera fluttar til láglønarlond, tí flutningskostnaðurin er fallin, tollmúrar eru burturtiknir, og ferðin og góðskan av vøru- og samskiftisflutningi er hækkað munandi. Hetta merkir, at arbeiðspláss vera niðurløgd og útflutt.

Í ídnaðarsamfelagnum var framleiðsluvirkið antin lagt har, sum rávøran var ella har, sum kundin var. Í einum alheimsgjørdum heimi verður framleiðslan løgd har, sum lægsti eindarkostnaðurin er.

## 8.1 Lønarpartur av framleiðsluvirði

Orsøkin, til at framleiðsla verður útveitt, er lønarlagið. Dansk Industri hevur gjørt eina lýsing av lønarpartinum í ymsum vinnum í Danmark. Í talvu 11 niðanfyri eru tøl fyri ymsar vinnur.

Talva 11. Lønarparturin av framleiðsluvirðinum í ymsum donskum vinnum

| | Fiskur | Sláturvirkir | Mejerí | Matvøruídnaður | Træídnaður | Klædnaídnaður |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vørunýtsla | 72% | 65% | 75% | 64% | 49% | 50% |
| Lønir | 13% | 16% | 10% | 15% | 29% | 23% |
| avskrivingar | 2% | 2% | 2% | 3% | 5% | 3% |

Kelda: Dansk Industri

Um hugt verður eftir lønarpartinum í klædnaídnaðinum er hann 23%, sum er høgt ímun til aðrar vinnur, og tað er eisini fleiri ár síðani, at klædnaídnaðurin varð útveittur til láglønarlond. Træídnaðurin hevur eisini ein høgan lønarpart og er eisini útveitttur.

Lønarparturin fyri fisk og fyri sláturvirkir hevur ikki verið so stórur, og tí hevur hann ligið í Danmark. Lønarparturin er ávikavist 13% og 16%. Tað, at matvørur kanska eru verri at útveita, hevur viðført, at hendan framleiðslan ikki hevur verið útveitt í sama mun. Men nú vísir tað seg, sum ferð er komin á hesa menning og meira og meira framleiðsla av fiski verður útveitt. Lønarparturin er ov høgur og tí er best at veita framleiðsluna út fyri at standa seg í kappingini við aðrar fyritøkur á altjóða marknaðinum.

Dansk Industri metir, at fiskaframleiðsla kann veitast út til eitt nú Kina og til Baltisku londini og Polen. Eitt nú kann framleiðsla við feskari rávøru framleiðast í Baltisku londunum og framleiðsla við frystari rávøru í Kina.

Tildømis er framleiðslan av royktum laksi flutt til Polen. Framleiðslan er lønartung og nógv er at spara við at flyta framleiðsluna til Polen. Rávøran er fesk og tí liggur framleiðslan í Polen væl fyri bæði viðvíkjandi feskari rávøru og flutningi til evropeiska marknaðin. Hendan gongdin er orsøkin til, at ávís roykjaríir í Danmark fingu so ringa lagnu. Tey fluttu ikki framleiðsluna til Polen, meðan tíð var, og sum kappingarneytarnir gjørdu.

Dansk Industri hevur eisini mett um, hvussu nógv er at spara við at útveita fiskaframleiðsluna til Kina og Baltikum. Tølini eru í talvu 12 niðanfyri. Fyri at seta hesi tøl inn í føroysk viðurskiftir er miðaltalið fyri lønarpartin hjá føroysku flakavinnuni sett saman við.

Talva 12. Lønarpartur í Føroyum og í øðrum londum.

| | Danmark | Føroyar | Kina | Baltikum |
|---|---|---|---|---|
| Vørunýtsla | 61% | 63% | 61% | 63% |
| Løn | 13% | 22% | 5% | 5% |
| avskrivingar | 2% | 3% | 3% | 2% |

Kelda: Dansk Industri og Rasmussen og Weihe

Dansk Industri metir, at alt annað líka er møguligt at spara 8% til 10% í lønarútreiðslum við at útveita framleiðsluna. Lønarparturin í føroysku flakavinnuni er 22%, sum er væl hægri enn donsku tølini. Lønarparturin er á hædd við lønarpartin hjá klædnavinnuni, og tí er orsøk til, at føroysku flakavirkini skulu útveita partar av framleiðsluni.

Lønartungar framleiðslur so sum vanligar frystar vørur hava størri orsøk at vera útveittar, meðan eitt nú feskfiskaframleiðsla og flaktur toskur ikki hava somu orsøk at vera útveitt. Um hugt verður eftir teimum einkultu virkjunum sæst hvørji virkir áttu at veitt út. Talva 13 niðanfyri vísir, hvussu stórur partur av framleiðsluvirðinum eru lønir.

Talva 13. Lønarpartur á ymsum føroyskum virkjum í 2002.

| Virkir | Lønarpartur |
|---|---|
| Eystís | 9% |
| Vestís | 10% |
| FarIta | 13% |
| Vaðhorn | 14% |
| Delta | 14% |
| Palm | 16% |
| Kósin | 20% |
| Norðís | 21% |
| Fiskavirking | 22% |
| Sandoy | 23% |
| Fiskavirkið | 25% |
| Suðurís | 25% |

Kelda: Rasmussen og Weihe

Stórur munur er á lønarpartinum hjá flakavirkjunum. Høvuðsorsøkin er kanska hon, at flakarvirkir, sum framleiða frystar úrdráttir og serliga tey, sum framleiða tey lutfalsliga bíligu fiskasløgini, hava høgan lønarpart. Hesi flakavirkini hava sostatt ein størri tørv á at veita framleiðsluna út.

Talva 13 gevur eina ábending um, at tey virkini, sum hava ein lágan lønarpart, eru tey virkini, sum framleiða saltfisk. Sostatt hava saltfiskavirkini ikki sama tørv á at veita framleiðsluna út.

## 8.2 Hækkandi lønir tilskunda útveiting

Hækkandi lønir vilja viðføra antin, at størri orka verður brúkt til at menna tøkni, sum kann avloysa lønartunga arbeiðsmegi, ella at lønartungar mannagongdir vera útfluttar til láglønarlond. Óansæð vilja arbeiðpláss í Føroyum fækka.

Um føroyska flakavinnan ikki megnar at framleiða eina vøru, sum er øðrvísi, og sum er framleidd eftir einum leisti, sum láglønarlond ikki megna, verður tað meiri lønandi at útveita framleiðsluna, tí ein arbeiðsgevari strembar eftir hægst møguligum vinningi til íleggjararnar. Sostatt vil hann leggja framleiðsluna har, lægstu eindakostnaðirnir eru – alt annað líka.

Ein øðrvísi vøra kann framleiðast í Føroyum. Tað veri seg liðugtvørur, har vitan verður løgd í vøruna ella feskar úrdráttir, sum eitt nú kinverjar ikki hava møguleika at framleiða. Seinna vøran setir tó stór krøv til undirstøðukervi úr Føroyum inn á meginlandi.

Um ein útveiting fer í gongd innan flakaframleiðsluna, vil hon viðføra eitt bygnaðarligt arbeiðsloysi í Føroyum, har ófaglærd skulu finna sær annað arbeiði. Nýggj arbeiði vera við tíðini skapt, men trupulleikin kann vera, at arbeiðsplássini krevja aðrar førleikar. Alheimsgerðin krevur liðiliga arbeiðmegi, sum kann flyta seg tvørtur um vinnur og fyritøkur. Ein uppsøgd flakakvinna í dag kann ikki byrja í einari KT –fyritøku í morgin.

Lækkandi handilsforðingar, bíligari og skjótari flutningur bæði fysiskt og tøkniligt viðføra, at tær lágu lønarútreiðslurnar eru atkomuligar fyri øll – eisini fyri føroyskar fyritøkur. Um kappingarneytar í eitt nú Íslandi og Norra flyta framleiðsluna til láglønarlond, vil liðugtvøran sum seld verður á ES marknaðinum lækka í prísi vegna tær lágu lønirnar. Føroyskar fyritøkur vilja tí koma undir trýst. Tær vera kanska ikki kappingarførar uttan eisini at veita framleiðsluna út. Um tær ikki veita út, vil prísurin fyri rávøruna lækka, sum vil skunda undir, at fiskurin fer óvirkaður av landinum – sum aðrir – útlendingar – flyta til láglønarlond. Sostatt er hetta ein gongd sum flakavinnan skal taka í álvara.

## 8.3 Nýggjur setningur fyri flakavinnuna

Alheimsgerðin viðførir, at útflutningsvinnan er undir harðari altjóða kapping. Fyri at klára seg í kappingini er neyðugt, at menningin í produktiviteti er eins høg og menningin hjá teimum útlendsku kappingarneytunum. Serliga er tað galdandi í Føroyum, har lønirnar eru væl hægri enn fyri tey lond, føroyingar eftirhondini kappast við.

Flakavinnan hevur framleitt fløk til útflutnings. Fyrimunirnir hava verið, at rávøran hevur verið beint uttan fyri dyrnar. Hetta er ikki ein fyrimunur í dag, tí ikki er so torført og kostnaðarmikið at flyta rávøru um landamørk. Láglønarlond hava góð evnir til at eftirlíkna mannagongdunum á flakavirkjunum í Føroyum og kunnu gera tær bíligari.

Láglønarlondini hava kanska lætt við at eftirlíkna vanliga framleiðslu, men hava ikki førleikan í sama mun at skapa nýggjar vørur, finna nýggjar marknaðir og menna verandi vørur. Hildið verður fast við kappingarføri hjá fyritøkuni við at gerast betri til framleiðslufyrireikandi uppgávur so sum planlegging, gransking, menning, snið, samanvið uppfylgjandi uppgávum so sum góðskutrygd, skjalapróvførslu, sølu og marknaðarførslu.

Nýggi setningurin hjá flakavinnuni verður sostatt nýskapan, vøru- og konsept-menning. Dentur skal leggjast á gransking, menning, sniðgeving, góðskustýring, sølu og og marknaðarførslu. Branding og storytelling og brúkaradrivin nýskapan og annars alt sum ger vøruna øðrvísi hevur týdning í alheimsgerðini.

Nýggja uppgávan verður at leggja vitan í vøruna og saman við einari góðari søgu at marknaðarføra vøruna sum nakað serstakt. Fysiska vøran hevur tá minnið týdning. Á henda hátt kunnu háglønarlond leggja dent á øðrvísi vørur, sum ikki kunnu eftirlíknast í láglønarlonum.

Samtíðis inniber nýggi setningurin hjá flakavinnuni útveganarstýring (supply chain management), tí allar mannagongdir, sum betri og bíligari kunnu gerast í láglønarlondum, skulu útveitast. Framleiðsluuppgávur skulu automatiserast, útveitast og effektiviserast. Flakavinnan skal sostatt hava førleika til at útveita

framleiðsluna. Lykilin er at hava liðiligar fyritøkur, har partar av virðisketuni vera býttir út til onnur.

Tað skal undirstrikast, at útveiting ikki er ein trupulleiki fyri vinnulívið – men ein trupulleiki fyri arbeiðsmarknaðin. Samstundis við, at framleiðslan verður útveitt, og fyritøkur aftur byrja at geva yvirskot, gera tær arbeiðsmegina arbeiðsleysa. Útveiting hongur sostatt saman við, hvussu mong onnur arbeiðspláss kunnu verða skapt.

Alheimsgerðin setir krøv til føroysku arbeiðsmegina. Hon viðførir, at lønartungir arbeiðshættir vera útfluttir og tey sum eru lættast at kappast við eru tey ófaglærdu, sum vilja síggja síni arbeiðspláss fækka.

Alheimsgerðin krevur tí eina liðiliga arbeiðsmegi, sum skjótt kann umstilla seg til nýggj viðurskiftir. Hinvegin um hon ikki er liðilig, er arbeiðsloysisvágin stórur.

Grunnleggjandi loysnin til eina liðiliga arbeiðsmegi – ein flytføra arbeiðsmegi – er útbúgvingar. Útbúgving gevur arbeiðsmegini størri møguleika at flyta seg tvørtur um vinnur og gevur henni betri førleika at leita sær eftir nýggjum arbeiði. Útbúgving gevur eisini vanliga atgongd til hægri løn, sum økir um livistøði hjá borgaranum.

Føroyingar kunnu ikki liva av at klippa hvørjum øðrum. Hetta er sostatt spurningurin, sum skal viðgerast og loysast, tí Føroyar kunnu ikki steðga alheimsgerðini.

Ístaðin fyri at alheimsgerðin verður ein kvøkkur fyri ófaglærdu arbeiðsmegina er uppgávan í komandi tíðum at fara í holt við eina skipaða umskúling av arbeiðsmegini.

Uppgávan í framtíðini skal sostatt ikki vera, hvussu nógv lønin kann hækka, men hvat gerast kann fyri at umskúla ófaglærdu arbeiðsmegina, soleiðis at hon kann takast við okkurt, sum gevur størri produktivitet og harvið hægri løn.

Longri tíð leiðslan á fyritøkunum og arbeiðsmegin bíðja við at tillaga seg alheimsgerðini, størri verður tillagingarkravið og størri verður arbeiðsloysið.

# 9. Keldulisti

Búskaparráðið. Effektiva lønarkappingarføri 1998

Danmarks Nationalbank. Kvartalsoversigt 1. kvartal 2005. Løn, konkurrence og betalingsbalance.

Dansk Industri. Lønarhagtøl fyri Danmark og Eurolond.

Dansk Industri. Værdiskabelse i fremtidens virksomhed

Føroya Arbeiðsgevarafelag, Smærugøta 9A, FO-100 Tórshavn. Lønarhagtøl

Havnar Arbeiðsmannafelag. Kanning av lønargongd og livikorum í Føroyum.

Johansen, Malan: Lønarkappingaføri. Serritgerð í MSc Management.

OECD Economic Outlook 76 Database. www.oecd.org

Ráfiskakeyparafelag, Smærugøta 9A, FO-100 Tórshavn. Kostnaðarmeting v.m.

Rasmussen og Weihe. Flakavirkir 1999 – 2003. Úrdráttir úr roknskapargreining

SNG-Faroes, Carl á Lag. Lønir og framleiðslukostnaður í Kina

Svenskt Näringsliv. Svenska Arbetsgivarforeningen. Lønarhagtøl